Barsilsskipanin

**Trygging av barsilspeningi**
Sjálvstøðugt vinnurekandi

Høvuðstreytin fyri at fáa barsilspening sum sjálvstøðugt vinnurekandi er, at trygging er teknað.
Vegleiðing til hvønn einstakan teig er aftast í umsóknarblaðnum saman við treytunum fyri at tekna trygging.
Vinarliga skriva við spjaldrastavum.

## 1. Virkisupplýsingar

| | |
|---|---|
| Navn: | V-tal: |
| Gøta og gøtunummar: | Postboks: |
| Postnummar og bygd/býur: | Telefon: |
| Virkisháttur: | |
| Vinnugrein: | |

## 2. Umsøkjari

| | |
|---|---|
| Navn: | P-tal: |
| Gøta og gøtunummar: | Postboks: |
| Postnummar og bygd/býur: | Telefon: |
| Teldupostadressa: | Fartelefon: |
| Síðan nær hevur vinnuvirkið verið høvuðsvinna tín? (dg. mð. ár): | |

## 3. Viðmerkingar

| |
|---|
| |
| |
| |
| |

## 4. Váttan frá umsøkjara

Eg loyvi Barsilsskipanini at útvega sær allar neyðugar upplýsingar um viðurskifti míni, eisini upplýsingar frá TAKS. Eg bindi meg til at geva Barsilsskipanini boð um allar broytingar, ið kunnu hava týdning fyri barsilsfarloyvið.

Eg vátti, at givnu upplýsingar eru sannar, at eg arbeiði á vinnuvirkinum, og at hetta er høvuðsvinna mín.

------------------------------
Dagfesting

----------------------------------------------------------------------------------
Undirskrift og stempul
*(Er einki stempul, skriva fornavn og eftirnavn hjá undir-ritandi við blokkbókstavum oman fyri undirskriftina)*

**BA05** 010122

**Trygging av barsilspeningi**
Sjálvstøðugt vinnurekandi

Barsilsskipanin

## Høvuðstreytirnar fyri at tekna trygging eru, at tú:

- hevur bústað í Føroyum,
- hevur inntøku frá persónligum arbeiði sum sjálvstøðugt vinnurekandi í Føroyum,
- hevur tað sjálvstøðuga vinnuvirksemið sum høvuðsvinnu.

Tryggingin kann í fyrsta lagi fáa gildi frá tí degi, Barsilskipanin hevur móttikið skrivliga umsókn. Tryggingin skal hava verið í gildi samanhangandi í minst 1 ár, áðrenn tú fært rætt til barsilspening. Tryggingin kostar 3000 kr. um árið fyri hvønn tryggjaðan. Kemur tryggingin ikki í gildi við ársbyrjan, skal fyrstu ferð rindast eitt lutfalsligt gjald av árliga gjaldinum. Lutfalsliga gjaldið er 3.000 kr. býtt við øllum døgum í árinum faldað við so nógvum døgum í árinum, sum tryggingin er galdandi.

Inntøka, vunnin í Føroyum seinastu 12 mánaðirnar áðrenn barsilsfarloyvið, skal ikki skjalprógvast. Sama er galdandi fyri upplýsingar úr vinnuskránni. Barsilsskipanin fær hesar upplýsingar frá TAKS. Grundarlagið, sum barsilspeningurin verður roknaður eftir, er inntøkan frá persónligum arbeiði sum sjálvstøðugt vinnurekandi fyri síðst lokna roknskaparár áðrenn fráveruna. Barsilspeningurin kann ikki vera meira enn kr. 25.000 um mánaðin.

**Lógargrundarlag**
Løgtingslóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001. Kunngerð um barsilspening til sjálvstøðugt vinnurekandi frá 31. mai 2001. Kunngerð um gjald til sjálvbodnu barsilspeningatryggingina frá 30. august 2021. Kunngerð um kærunevnd hjá barsilsskipanini frá 14. juni 2004.

## Vegleiðing til hvønn einstakan teig

**1. Virkisupplýsingar**
Her skal m.a. upplýsast navn, v-tal og bústaður. Somuleiðis skal upplýsast, hvønn virkishátt og vinnugrein virkið hevur. Virkisháttur og vinnugrein er t.d. einstaklingavirki og hárfríðkan.

**2. Umsøkjari**
Her skal m.a. upplýsast navn, p-tal og bústaður. Somuleiðis skal upplýsast, nær vinnuvirkið bleiv høvuðsvinnan.

**3. Viðmerkingar**
Eru nakrar viðmerkingar, skulu tær skrivast her.

**4. Váttan frá umsøkjara**
Her váttar umsøkjarin, at givnu upplýsingarnar eru rættar, og at boðað verður frá, um broytingar eru, ið kunnu hava týdning fyri Barsilsskipanina. Samstundis gevur umsøkjarin Barsilsskipanini loyvi at útvega sær allar viðkomandi upplýsingar frá TAKS.

---

Umsóknarblaðið skal útfyllast nágreiniliga. Vanta upplýsingar ella neyðug skjalprógv, ger Barsilsskipanin vart við hetta. Tá skulu upplýsingarnar útvegast Barsilsskipanini innan 14 dagar, annars fellur umsóknin burtur.
Um skeivar ella misvísandi upplýsingar verða givnar, verða goldnar upphæddir afturkravdar, og møgulig revsing við sekt ella hefti verður givin. Upplýsingar á umsóknarblaðnum kunnu í sambandi við eftirlit eftirkannast við heimild í § 21 í lóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001.

Gjølligari kunning um barsilsfarloyvið er at finna á heimasíðuni hjá Barsilsskipanini, www.barsil.fo.

**Henda umsókn kann innihalda persónligar upplýsingar, gáa tí um trygdina**
Send umsóknina um álítandi postskipan til barsil@taks.fo ella lat okkum hana á annan tryggan hátt.

TAKS, Postboks 2151, 110 Tórshavn, tel. 35 26 00, barsil@taks.fo.